# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit hava tikið enn eitt týðandi stig, og vit helma ikki í, fyrr enn vit kunnu broyta Washington*
*(Barrack Obama)*

# So er hann á odda



*Barrack Obama: - Tann nýggja rørslan helmar ikki í, fyrr enn vit fáa broyting í Washington*

**Barrack Obama gjørdi aftur bart í gjár. Hann vann øll trý uppstillingarvalini og er nú fyri fyrstu ferð framman fyri Hillary Clinton**

Klokkan trý í nátt vistu amerikonsku sjónvarpsstøðirnar at siga, at nú var Barrack Obama farin fram um Hillary Clinton í uppstillingardystinum hjá demokratunum. Sambært CNN hevði hann tryggjað sær 1.195 valmenn, men Hillary Clinton er í hølunum á honum við 1.178 valmonnum.

Tað var væntandi, at Barrack Obama fór at vinna valini í Virginia, Maryland og Washington D.C. í gjár, men politiskir eygleiðarar í USA siga, at úrslitið var kortini enn ein ósigur hjá Hillary Clinton.

Kanningar í gjár vístu, at 90 prosent av teimum svørtu veljarunum atkvøddu fyri Obama, og í Virginia fekk hann eisini stuðul frá teimum flestu monnunum. Soleiðis hevur tað verið í øðrum statum eisini, men hjá Hillary Clinton má tað kennast hugstoytt, at 51 prosent av teimum hvítu veljarunum atkvøddu fyri Obama, og at heili 58 prosent av kvinnunum atkvøddu fyri honum.

Við sigrunum í Virginia, Washington D.C. og Maryland hevur Barrack Obama vunnið sjey av teimum seinastu uppstillingarvalunum hjá demokratunum.

Hjá republikanarunum vann John McCain øll trý uppstillingarvalini í gjár. Kortini var sigur hansara sera tepur í Virginia, har tað leingi stóð á jøvnum millum McCain og Mike Huckabee. Politiskir eygleiðarar siga, at valið í Virginia var enn eitt tekin um, at McCain hevur ikki takið á teimum konservativu veljarunum hjá republikanarunum.

### Ikki avgjørt enn

Hóast sigursrøðina hjá Barrack Obama tora politisku eygleiðararnir í USA ikki at siga, at talan er um eina flóðaldu, sum ikki er til at steðga, og sum Hillary Clinton tí fer at drukna í. Eygleiðararnir vísa á, at kappingin teirra millum er so jøvn, at sjálvt um Obama fær 55 prosent í øllum teimum statunum, sum eru eftir, er tað kortini ikki nóg mikið til at vinna tað endaliga uppstillingarvalið. So verða tað teir serligu valmenninir, sum fáa tað avgerandi orðið at siga, og meirilutin av teimum styðja Hillary Clinton.

Í sínari takkarrøðu í nátt segði Barrack Obama, at tey seinastu úrslitini benda á ein nýggjan meiriluta, sum er settur saman av fólki úr øllum pørtum av landinum, øllum rasum og bólkum, sum taka undir við hansara fráboðan um eina vón í framtíðini.

- Vit hava vunnið í eystri og vestri, suðuri og norðuri og miðskeiðis í hesum landinum, sum vit øll elska. Hendan rørslan steðgar ikki, fyrr enn ein broyting hendir í Washington, og í kvøld hava vit tikið eitt týðandi stig, segði Obama, tá hann í morgun kom til Wisconsin, har val verður í næstu viku.

Hillary Clinton hevði lagt leiðina suður til Texas, tí tað er greitt, at skal hon vinna uppstillingarvalið, má hon vinna í øllum teimum trimum stóru statunum, sum eftir eru, Texas, Ohio og Pennsylvania.

### Tekur frá Hillary

Sigurin hjá Barrack Obama í gjár var sera greiður. Í Virginia fekk hann 64 prosent av teimum demokratisku atkvøðunum, í Maryland 62 og í Washington D.C. 75 prosent. Í øllum trimum var veljaraskarin júst tann rætti fyri Obama, tí har eru nógv svørt og nógv við góðari útbúgving.

Men kanningarnar í gjár vístu eisini, at Obama hevur tikið nógvar veljarar frá Hillary Clinton. Sum væntað fekk hann tær flestu atkvøðurnar frá teimum svørtu og frá monnunum, men hann fekk eisini tey flestu hvítu at atkvøða fyri sær og tær flestu kvinnurnar.

Í Virginia fekk hann eisini tær flestu atkvøðurnar frá fólki av latínamerikonskum uppruna, og í Maryland atkvøddu tey flestu gomlu og fólk á bygd fyri honum. Í øðrum statum hava júst hesi verið týdningarmiklir stuðlar hjá Hillary Clinton. Politisku eygleiðararnir siga, at hon noyðist nú at leggja seg eftir at fáa atkvøðurnar frá teimum nógvu latínamerikanarunum í Texas og teimum eldru og lágløntu í Ohio og Pennsylvania.

### Trýr upp á undur

Við at vinna øll trý valini í gjár hevur John McCain tryggjað sær eina so greiða leiðslu í kappingini hjá republikanarunum, at tað skal eitt undur til, um hann skal tapa fyri Mike Huckabee. Men Huckabee hevur júst sagt, at hann trýr ikki upp á tøl, men upp á undur, og tí dugir hann ikki at síggja nakra grund til at gevast.

Í Virginia gav Huckabee eisini McCain okkurt at hugsa um, tí har vann Huckabee í fleiri valdømum, og í teimum mest konservativu økjunum fekk hann heili 80 prosent av teimum republikonsku atkvøðunum.

Hetta merkir sambært amerikonsku eygleiðarunum, at McCain hevur ikki fingið fatur á teimum mest konservativu veljarunum, og teimum fær hann brúk fyri, um hann skal vinna á demokratunum í novembur.



*Mike Huckabee er langt aftan fyri John McCain, men hann trýr framvegis upp á eitt undur*

## STUTT SAGT

### Putin ávarar Ukraina

Russisku myndugleikarnir ávara nú grannalandið Ukraina ímóti at fjeppast ov nógv uppi í vesturlendsku verjusamgonguni NATO. Tá ukrainski forsetin, Viktor Justsjenko, var á vitjan í Moskva í gjár, fekk hann at vita frá Vladimir Putin, forseta, at Russland fer ikki at sita hendur í favn, um Ukraina fer upp í NATO og kanska loyvir USA at seta rakettverju upp í landinum. Sambært russiskum fjølmiðlum segði Putin, at so hava russar bara eitt at gera, og tað er at venda sínum rakettum ímóti Ukraina.

### Regn í Angola

Tað hevur verið oysandi regn í Angola teir seinastu dagarnar, og tað hevur elvt til vatnflóð nógvastaðni. Serliga illa stendur til har suðuri í landinum, og myndugleikarnir siga, at meiri enn 10.000 fólk hava mist hús og heim av vatnflóðini. Tey, sum eru vorðin heimleys, hava fingið tjøld at vera í fyribils, og nøkur hava fingið innivist í skúlum. Angolsku myndugleikarnir siga, at teir hava ikki fult yvirlit yvir støðuna. Eitt nú vita teir ikki við vissu, hvussu støðan er í býnum Ondjiva, sum stendur undir í vatni.

### Flýggja til Uganda

Ófriðurin aftan á tjóðartingsvalið í Kenya hevur fingið umleið 12.000 fólk at flýggja úr landinum um markið til Uganda. Ugandisku myndugleikarnir og ST siga, at fleiri av teimum, sum eru komin um markið, hava mist hús og heim, tí álopsmenn hava sett eld á hús teirra. Í Uganda eru flóttafólkini savnað í einari stórari legu nærhendis markinum. Hildið verður, at ófriðurin í Kenya hevur noytt umleið 300.000 fólk frá húsi og heimi. Nógv tey flestu eru nú flóttafólk í egnum landi.